# Sannur hátíðardámur



Doulos kom til Klaksvíkar mikukvøldið. Fýrverk, horntónar, kórsangur og røður vóru á skránni, og hátíðardámurin var ikki til at taka feil av

**Mikukvøldið um sekstíðina kom elsta ferðamannaskipið í heiminum, Doulos, á Klaksvík. Nógv fólk tók ímóti, og aftaná var hugnaløta í Betesda**

MÓTTØKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Rættuligur hátíðardámur var á vestaru bryggju mikukvøldið, tá Doulos kom á Klaksvík. Hornorkestrið spældi marsjir og sálmaløg, og somuleiðis sang Betesdakórið. Fýrverkið dundi millum fjøllini, og hóast tað var nakað ljóst, so setti tað sín dám á móttøkuna.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, beyð skipi og manning at vera hjartaliga vælkomin til Klaksvíkar og ynskti, at tey skuldu kenna seg heima hesar dagarnar.

Eisni Magni Jacobsen bar fram heilsu. Síðani helt leiðarin fyri OM felagsskapinum røðu og at enda føroyski kapteinurin, Árni B. Jensen.

Hann takkaði so hjartaliga fyri móttøkuna og bjóðaði øllum at vera hjartaliga vælkomnum umborð á skipið.

Tá móttøkan var av, fóru heilt mong fólk umborð og seinni varð skipað fyri hugnaløtu í Betesda, har øll vóru vælkomin.

Doulos verður liggjandi í Klaksvík inntil mánadagin 5. juli, tá leiðin gongur til Fraklands.

## Nýggj kantata verður at hoyra á ólavsøku

**Pauli í Sandagerðir og Gunnar Hoydal hava gjørt nýggja kantatu, sum verð ur at hoyra á ólavsøku. Kórsamband Føroya bjóðar nú til fyrstu venjing til ólavsøkusangin sunnudagin**



KÓRSANGUR
*Tíðindaskriv*

Til 900 ára ólavsøkuhátíðina 1930 skrivaðu teir báðir Jógvan Waagstein og Edvard Mitens eina kantatu at heiðra minnið um Ólav kong hin Heilaga, sum fall á Stiklastøðum 29. juli 1030. Hendan Ólavsøkukantatan hevur síðan, við onkrum sliti innímillum, meira enn nakað sett dám á hátíðarløtuna ólavsøkudag í sambandi við skrúðgonguna úr kirkjuni og niðan í Tinghúsið.

Til ólavsøkuna ár 2000 fekk Kórsamband Føroya, sum nú skipar fyri hesum fasta tátti í ólavsøkuhaldinum, tað hugskot at bjóða til kappingar um nýggja, alternativa ólavsøkukantatu. Vinnarakantaturnar nr. 1, 2 og 3 vórðu framførdar hvør eftir aðra tey fylgjandi árini 2000, 2001 og 2002.

Í fjør var gamla kantatan aftur á skránni; men til ólavsøkukórsangin í ár verður enn ein nýggj kanata at hoyra. Tað eru teir báðir listamenninir Pauli í Sandagerði og Gunnar Hoydal, sum nú hava fullført eina ætlan, sum tá eisini var upp á tal. Nýggja kantatan, sum hevur heitið Vindar, er fyri blandað kór við nakað av solosangi - tenor og sopran. Forvitnisligt við hesari kantatu er m. a. tað, at kórsangurin fær fylgispæl av einari trompet og einari trombon.

Fyrsta venjingin til ólavsøkusangin í ár, har øll eru vælkomin at vera við, verður í Kommuskúlaskálanum nú komandi sunnudag 4. juli kl. 15 - 18, og sangarar, sum ætla at syngja við á ólavsøku, verða bidnir um at møta.

# Doulos á Klaksvík

**Tað var sum sild í tunnu í samkomuhúsinum, Betesda í Klaksvík, mikukvøldið, har fólk úr fleiri samkomum vóru komin saman til hugnaløtu, sum varð hildin fyri manninginí á Doulos**

DOULOS
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Mikukvøldið leitaðu fólk frá fleiri trúarbólkum sær í samkomuhúsið, Betesda í Klaksvík, at hugna sær saman við manningini á Doulos. Eisini teir báðir, Poul Færø og Hans Eiler Hammer, nýttu høvið at fáa sær eitt gott prát*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Skipið kom á Klaksvík um náttúrðatíð mikukvøldið og verður liggjandi til sunnudagin.

Í faldara, sum er prentaður í samband við føroyatúrin, verður lýst við hópin av tiltøkum. Eitt nú verður altjóða mentanarkvøld í KÍ- høllini í Klaksvík leygarkvøldið. Tá verður høvi, við tónleiki, leiki, sangi og dansi, at síggja framsýningar og hoyra mongu ljóðini frá ymiskum mentanum kring heimin.

Hetta er eitt tiltak, ið er ætlað allari familjuni, og kostar 50.00 krónur fyri hvønn.

Í samband við altjóða mentanarkvøldið, siglir Dúgvan av Klaksvík til Leirvíkar klokkan 24.00.

Skipið er opið fyri almenninginum hvønn dag frá klokkan 10.00-22.00.




# Seinasti møguleiki at vera við...






fyri 2

**VINN dreymaferð til Kypros**
**við føroyska A-landsliðnum og MB Tours!**

Sunnukvøldið 4. juli verður drigið um høvuðsvinningin millum øll sms-boðini og telefonuppkallini, sum eru komin inn.

**SEND SMS varm TIL 1441**
**ella ring 90 51 90**

Nú er seinasti møguleiki at vera við í stóra lutakastinum um eina dreymaferð við landsliðum til Kypros. Tað einasta tú skal gera fyri at vera við í kappingini, er at senda sms-boð **varm** til **1441** ella ringja **905190** og skráseta títt uppkall. Drigið verður sunnukvøldið 4. juli.

**Kostnaður:** Tað kostar kr. 25,- fyri hvørt SMS boð ella uppkall + vanligan takst.

*Tey, sum kunna luttakað í kappingini eru:*
***Til 905190:** Allir fastnetskundar hjá Føroya Tele, uttan vekslarar, kort/mynt-telefonir og telefonir frá útlandinum.*
***varm til 1441:** Øll GSM hald frá Føroya Tele*

Shell FARODANE City hallo.fo MB-TOURS HARALDSEN

**Varmakeldustevnan 2. - 4. juli 2004**